*Phillips aftur í Føroyum - hava gjørt heimaarbeiðið:*

# Góðar vónir um olju og gass við Føroyar

*Føroyar standa sera frammaliga í arbeiðsskránni hjá Phillips*



*Teir tríggir Phillips-menninir, sum júst hava vitjað í Føroyum og greitt myndugleikum frá sínum arbeiði og framtíðar ætlanum. Fv. Jakob Rugland, sum er settur at taka sær av spurningum, sum viðvíkja føroyska økinum, Richard Vernon, stjóri, stjóri og John Jewhurst, sum arbeiðir við oljugoymslum í undirgrundini. Mynd Jan*

JAN MÜLLER

-Vit eru komnir til Føroya fyri at lurta, hvat tit hava at siga um eina komandi oljuvinnu og vit vilja so frá byrjan fara avstað aftur og gera okkara heimaarbeiði væl og virðiliga.

Hetta segði ein av stjórunum í stóru oljufyritøkuni Phillips Petroleum, Richard Vernon, tá hann vitjaði í Føroyum fyrr í ár.

Nú eru teir so aftur her. Phillipsfólkini. Hesaferð eru teir tríggir mans og millum teirra er eisini norðmaðurin Jakob Rugland, sum er settur til burturav at vera umboð og ábyrgdarmaður hjá Phillips fyri alt tað føroyska økið.

Í vísitkorti hansara stendur á føroyskum „Umboðsmaður Phillips í Føroyum".

### Trúgva uppá eina oljuframtíð í Føroyum

-Vit hava tikið hetta stigið, tí vit trúgva, at ein framtíð er í eini oljuvinnu í Føroyum, sigur Richard Vernon, sum vónar, at teir hava megnað at gera sítt heimaarbeiðið nóg væl, nú teir eru komnir aftur til Føroya fyri at greiða myndugleikum frá ætlanunum hjá oljufelagnum - og hvar felagið stendur í løtuni í spurninginum um at vera við í kappingini at leita eftir olju og gassi við Føroyar.

Jakob Rugland, sum starvast á skrivstovuni hjá Phillips í Stavanger, arbeiðir annars sum fyrisitingarstjóri og hevur eina fortíð hjá SAS, áðrenn hann kom til Phillips.

Hetta er eitt vakurt og spáðsamt land við góðum fólki av norskari rót. Vónandi kunnu vit fáa eitt gott samstarv við føroyingar, sigur Jakob Rugland, sum í framtíðini verður maðurin hjá Phillips í Føroyum.

### Føroyar frammaliga á listanum

At Phillips sum eitt av teimum fyrstu oljufeløgunum hevur fingið sín egna umboðs- og ábyrgdarmann fyri Føroyar merkir eisini, at hetta oljufelagið ikki ætlar sær at bíða og vita, hvat aðrir gera. Felagið hevur tvørturímóti stórar ætlanir við tí føroyska økinum og hevur sett tað ovast á listan yvir økjur í nyggj øki.

-Vit hava í fyrstu atløgu valt at fara varliga fram og kodda dýpið. Úrslitið av kanningunum, sum vit hava gjørt og sum vit hava látið aðrar gera, eru sera positiv og eggja okkum so avgjørt til at fara víðari, sigur Richard Vernon við Tíðindablaðið Sosialin.

Hann leggur aftrat, at tað er eingin loyna, at Phillips fegið kundi hugsað sær at endurtikið succesina frá Norðsjónum, tá olja varð funnin har seinastu í 60-unum.

-Tá var tað Phillips sum fann tá fyrstu stóru oljukelduna og fór undir framleiðslu, nevniliga Ekkofisk. Nú hyggja vit eftir einum føroyskari Ekkofisk keldu ella hvør veit fleiri, sigur Richard Vernon við einum brosi og heldur fram:

-Vit hava júst greitt oljufyrisitingini frá úrslitinum av okkara kanningum og eg haldi sjálvur, at her er nógv áhugavert at fara víðari við, og tað er greitt, at vit ætla okkum at halda fram við kanningunum við tí fyri eygað at vera við í tí fyrsta útbjóðingarumfarinum á føroyskum øki um ikki so langa tíð.

### Írland, Rockall - Hetland og Føroyar

Richard Vernon greiðir frá, at hóast Phillips enn ikki hevur nakran lisens vestan fyri Hetland, so hava teir nú í fleiri ár arbeitt við kanningum av ymsum slag, bæði vestan fyri Hetland og norðan fyri Rockall. Úrslitið av hesum kanningum er, at møguleikar eru fyri, at tað kunnu vera týðandi olju- og gassgoymslur í hesum økjum.

Talan er bæði um seismiskar kanningar, tyngdar og magnetiskar kanningar o.a. Tað hevur eydnast felagnum at identifisera og gera kort, sum eisini fer í smálutir, av sokallaðu Mesozoic og Pre-Mesozoic strukturum í økinum.

Vitanin, sum Phillips hevur fingið við hesum kanningum, er av slíkum slag, at fyritøkan nú er í eini støðu at kunna fara víðari




*Kortið vísir stóra virksemið hjá Phillips í økinum vestan fyri Hetland, í Hvíta økinum á føroyska landgrunninum og tí stóra økinum norðan fyri Rockall.*




og tulka og evaluera økini, og eisini vestur eftir førbi Westray Ryggin vestan fyri Hetland, tvørturur um Hvíta økið og inn á føroyska landgrunnin.

Seismikkurin hjá Western á føroyskum øki saman við kanningunum hjá World Geoscience úr luftini hava hjálpt Phillips at gera sær eina mynd av føroyska økinum. Viðgerðin av hesum tilfarinum vísir týðiliga, at har eru Pre Tertiary strukturar undir basaltinum og eisini eru møguleikar fyri, at har eru tað teir á fakmáli kalla „Palaeocene and Eocene reservoir sands." Fyri oljufólk eru hetta týðandi tekin.

Endamálið hjá Phillips er nú at brúka vitanina frá økinum vestan fyri Hetland og norðan fyri Rockall til at skilja betur føroysku undirgrundina.

**Gera fleiri kanningar við Føroyar í ár**

Richard Vernon sigur víðari, at teir tí longu í ár fara undir fleiri nýggjar kanningar á føroyskum øki. Her er bæði talan um vanligan seismikk og um annað slag av kanningum eitt nú á sjálvum havbotninum. Møguliga fara teir at koma hendavegin við tveimum seismikkskipum í heyst.

Phillips ger eisini eitt stórt arbeiði til tess at kunna vera við, tá 17. útbjóðingarumfarið í breskum øki verður klárt. Tað skuldi vera klárt í november, men er nú útsett einar tríggjar mánaðir orsakað av nýggjum EU-reglum.

Phillips hevur í løtuni nakrar lisensir í økinum, sum onkur hevur valt at kalla The Western Slope, ið gongur frá Írlandi og víðari norður eftir til Føroya og Hetland.

-Vit hyggja eftir hesum økinum sum eitt samanhangandi øki og brúka vitanina úr einum parti til at kunna skilja hin partin ostr. sigur John Jewhurst, sum arbeiðir við jarðfrøði o.l. hjá Phillips. Her serliga alt sum hevur við sjálvar olju- og gassgoymslurnar at gera.

Teirra kanningar fevna um økið vestan fyri Írland, vestan fyri Hetland og nú eisini á føroyskum øki og so norðan fyri Rockall og økið har nærhendis.

**Ekkofisk er gimsteinurin hjá Phillips**

Vit eru sera virknir í [illegible] tí bretska og norska partinum av Norðsjónum. Nú vilja vit víðka hetta virksemið til eisini at fevna um økini í Norðuratlantshavi sigur Richard Vernon, sum annars ikki kann láta vera við at siga frá gleði síni yvir, at Phillips júst hevur fingið endurnýggjað EKKOFISK-lisensin við ikki minni enn 25 árum til 2028. Hetta er komið í lag eftir, at Phillips og onnur oljufeløg nú skulu til at útbyggja Ekkofisk fyri ikki minni enn 18 milliardir krónur.

Phillips Petroleum er eitt av teimum 19 feløgunum, sum eru við í Lopra. Eisini her rokna teir við at fáa týðandi upplýsingar um føroysku undirgrundina og upplýsingar, sum teir kunnu fáa nyttu av í forkanningunum á føroyskum øki sum heild.

**Hyggja eftir nýggjari tøknifrøði á stórum havdýpum**

Phillips vísir eisini stóran áhuga fyri tí tøkniliga útviklinginum á oljuøkinum og her verður serliga hugsað um tøkniliga útviklingin í sambandi við útgerð á stórum dýpum sum eitt nú Føroyum. Her eru teir í løtuni í samstarvi við Mc Dermott-fyritøkuni við at finna fram til nýggjar loysnir í slíkum farvatni. M.a. í sambandi við at fáa gassið á stórum dýpum til høldar á skilabesta hátt og at fáa lønandi vinnu burtur úr gassinum.

Ætlanin hjá Phillipsfólkunum, sum vóru í Føroyum herfyri, var eisini at vitja í Lopra. Men tann ferðin mátti avlýsast orsakað av mjørka.

Sosialurin skilir, at Phillips enn arbeiðir við ætlanum um at finna sær ein ella fleiri partnarar á føroyskum øki. Men tað hava umboðini hjá fyritøkuni ongar viðmerkingar til í løtuni.

**Biofar**

Undir vitjan síni í Føroyum hittu umboðini hjá Phillips eisini Arna Nørrevang á Biofar í Kaldbak. Phillips hevur sum tað 4. oljufelagið boðið sær at vera við til at fíggja stóru kanningunum av havumhvørvinum við Føroyum, sum nú hevur verið í gongd í nøkur ár.

Teir gjalda við afturvirkandi megi Richard Vernon sigur, at slík kanning hevur ómetaliga nógv at siga, tí hon skal kortleggja alt økið, áðrenn farið verður undir eina møguliga oljuvinnu. Hetta hevur týdning tá talan er um dálkingarspurningar.






**PIZZA-VINIR**

Hevur tu hug at fáa eina ella fleiri **PIZZA** inn á gólvið, so ring **tlf. 18866**, og tú hevur PIZZA'ina innan ein tíma.

Vit í **PIZZARIA** royna altíð at hava kostnaðin so lágan sum møguligt, soleiðis at kundin bert rindar 30 kr. fyri heimkoyringina. *Hetta tilboð er tó bert galdandi fyri viðskiftafólk í Tórshavn*

Vit vóna, at hetta tilboð kemur væl við.

**PIZZARIA**
**Tlf. 18866**




**PIZZA-VINIR**

Hevur tu hug at fáa eina ella fleiri **PIZZA** [illegible] tlf. 18866 og tú hevur PIZZA'ina innan ein tíma.

Vit í **PIZZARIA** [illegible] altíð at hava kostnaðin so lágan sum møguligt soleiðis at kundin bert rindar 30 kr. fyri heimkoyringina.

Vit [illegible] at hetta tilboð kemur væl við.

**PIZZARIA**
Tlf. 18866